# Eivør í Mentanarhúsinum og Læraraskúlahøllini

**Eivør Pálsdóttir er í løtuni á konsertferð saman við Danmarks Radio Big Band. Konsertferðin fevnir um konsertir í Føroyum og Danmark. Nú er greitt, at tann eina konsertin verður í Havn**



*Eivør og trumman, ella Eivør í Vatninum myndirnar hjá Bárður á fløguhúsanum til Trøllabundin*

KONSERTFERÐ

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eivør Pálsdóttir er í løtuni á konsertferð saman við Danmarks Radio Big Band í Danmark og í Føroyum. Konsertirnar í Føroyum verða hóskvøldið 13. oktober í Læraraskúlahøllini í Havn og fríggjakvøldið 14. oktober í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Tað hevur verið rættuliga ógreitt hvar tann eina av konsertunum varð hildin, fyrst var ætlanin av Norðurlandahúsið skuldi verða karmur, men húsið verður umvælt hesar dagar. Síðan varð tosað um tvær konsertir í Fuglafirði, men sambært fyrireikarunum G! Music og umboðunum hjá Eivør, verður konsertin nú Læraraskúlanum.

### Fyrstu ferð í Føroyum

Hetta er fyrstu ferð at Danmarks Radio Big Band vitjar í Føroyum og talan verður um eitt fult mannað bigband, ið er av mest virdu Big Bandum.

Henda konsertferð endar í operahúsinum í Keypmannahavn mánadagin 17. oktober, har Eivør og Etta Cameron vera solistar hjá Big Bandinum.

DR Big Band kundi í summar hátíðarhalda sín 40 ára føðingardag og hevur hesi árini spælt seg upp í sverviektaraflokkin innan danskan, eins væl og altjóða jazz. Orksetrið hevur spælt saman við fleiri av mætastu tónleikanøvnum í heiminum sum eitt nú Miles Davis, Van Morrison, David Sanborn, Stan Getz, Dizzy Gillesbie, The Manhattan Transfer, John Schofield, Toots Thieleman, Benny Golson og nú eisini Eivør Pálsdóttir.

### Vælumtókt fløga

Eivør og Big Bandið góvu fyrr í ár fløgu út saman, sum varð sera væl móttikin og seldi heili 5000 eintøk áðrenn hon kom út! Fløgan fekk einastandandi ummæli og fyri kortum varð hon kosin "mánaðarinnar fløga" í hátt virda týska tíðarritinum Audio. Konsertirnar saman við Big Bandinum taka støði í hesi fløguútgávuni.

Atgongumerki til konsertirnar fáast í Norðurlandahúsinum og Kunningarstovunum í Havn og Runavík.

# Skúlabarnatenn í fokus

TANNARØKT

Skúlarenningardagurin í skúlunum í Havnar kommunu, sum verður fríggjadagin 7. oktober, verður í ár eitt sindur øðrvísi enn undanfarin ár.

Fyri at seta fokus á tenn, sunnan mat og drekkivanar hevur Barnatannarøktin í Tórshavnar kommunu bjóðað sær til at koma út í skúlarnar við frískari frukt, vatnfløskum og tannkremi.

Øll starvsfólkini í Barnatannarøktini eru við í tiltakinum, og tí er Tannlæknastovan stongd henda dagin.

# Svimjihøllin opin allan dagin

**– Hví keða seg í heystfrítíðini, tá ið Svimjihøllin í Havn er opin allan dagin?**



SVIMJING

– At svimja er ein sonn fólkaítrótt fyri bæði smá og stór. Nógv fólk koma í svimjihøllina í Gundadali, og síðani hon læt upp í 1982, er áhugin at svimja blivin munandi størri. Umleið 150.000 fólk koma í høllina árliga, og hetta svarar til, at hvør borgari í kommununi svimur í miðal 10 ferðir um árið.

Soleiðis siga tey av Tórshavnar Býráð, nú avgjørt er at leingja um svimjitíðina í heystfrítíðini.

Leiðslan í Svimjihøllini hevur gjørt av sum nakað nýtt, at Svimjihøllin í heystfrítíðini, eins og í summarfrítíðini, verður opin fyri almennari svimjing mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag út í eitt frá kl. 6.45 til kl. 20.00 á kvøldi.

Hinar upplatingartíðirnar verða tó óbroyttar:
mikudag er opið
frá kl. 6.45 til kl. 9.00
leygardag frá kl. 9.00
til kl. 17.00
sunnudag frá kl. 8.00
til kl. 10.00 og frá kl.
14.00 til kl. 17.00

Í heystfrítíðini er altso møguleiki at svimja allan dagin, og soleiðis fáa nakrar góðar og hugnaligar løtur í Svimjihøllini.

## Dvørgarnir og Snjóhvíta á Læraraskúlanum

SJÓNLEIKUR

Leikurin Dvørgarnir og Snjóhvíta hjá 3.p á Føroya Læraraskúla verður sýndur á læraraskúlanum hóskvøldið kl 19.

– Her verður høvi til at fáa eina góða uppliving saman við børnum tykkara, siga næmingarnir í 3. p.

Atgongumerki til leikin fáast til keyps á Føroya Læraraskúla tveir tímar undan sýning.

## Kularrøtur eiga toppin á hittlistanum



Mest selda fløga á sølulistanum hjá Føroya størsta tónleikahandli 3'aranum er hesa vikuna nýggja savnsfløgan hjá Kularrótum. Tví-fløgan við ikki færri enn 29 barnasangum, m.a. hittum sum "Hon er omma mín", "Grønir menn frá Pluto", "Kalla meg Babe", "Bilurin hjá okkum" og Trøllapætur løgum, syftir øllum hesa vikuna.

"Now that's what I call music 13" sum tók ovastu rók seinastu viku, er kroyst niður á annað pláss hesa vikuna. Kim Hansen er trúgvur í toppinum, og liggur hesa vikuna nummar trý. Førist við Páll Finnur Páll á 6. plássi og andaligir sangir hjá Árna og Marner á 8. plássi eru hini bæði føroysku innsløgini á listanum. "Lívsins Land" hjá Ólavi á Váli, ið lá ovast á listanum í tríggjar vikur, áðrenn Now 13 í seinastu viku tók ovastu rók, er dottin heilt av listanum hesa vikuna.

**nud**

## Take off í REX

Leygarkvøldið fara Take Off á pallin í REX. Bólkurin, ið hevur sínar røtur í útiseta umhvørvinum í Århus, er spjaddur um danska kongaríkið, við limum í Århus, Keypmannahavn og Tórshavn, men nú verður altso høvi at hoyra teir aftur.

Bólkurin liggur tónlistarliga eitt stað ímillum Taxi og Føstufressar og fløgan blanda bomm, er eitt nú spæld nógv í Útvarpi Føroya.

**nud**

## Føroyskur tónleikur sýnast fram í Runavík

FaroExpo vísir eisini føroyskan tónleik fram, nakrir av fremstu bólkum í landinum fara á pallin á messuni í Runavík. Lena við sínum vakra poppi, 200 við sínum ráða punkrokki og Týr við sínum víkingamálni vísa eitt breitt úrval úr føroyskum tónleiki.

FaroExpo verður hildið í Ítróttarhøllini í Runavík 25.-27. oktober. Høvuðsendamálið er at varpa ljós á førleikan hjá føroyskum útflutningsfyritøkum mótvegis útlendskum samstarvsfeløgum. Við tónleiki og undirhaldi, sum verðandi ein alt størri partur av heimsbúskapinum, er tað ivaleyst eitt sera náttúrligt stig, at sýna henda partin av okkara tilfeingi fram.

Tað verður spennandi at vita hvussu hetta spælir av. Á North Atlantic Fishfair, varð ein roynd gjørd við livandi tónleiki, men tá klagaðu so nógvir av messuluttakarunum, at konsertin við Fólkayvirlitinum varð stytt.

**nud**

## Suð í Suðuroynni

**Kórið Suð hevur konsert í Suðuroynni leygarkvøldið**

TÓNLEIKUR

*dagfinn@sosialurin.fo*

Vælumtókti kórbólkurin Suð hevur havt konsertir kring landið og eru konsertirnar sera væl fagnaðar. Leygarkvøldið sleppa suðuroyingar at hoyra Suð.

Tá verður Suð at hoyra í høllini í Trongisvági. Tað er TB sum skipar fyri tiltakinum og fyrireikararnir vænta sær nógv av konsertini og at nógv fólk leita sær í høllina at hoyra Suð, sum er eitt av mest fagnaðu nøvnunum á føroyska pallinum júst nú.